

*Mamma hesi trý systkini var Sakaris-Marianna, sum misti mannin tíðliga. Hon var eitt arbeiðsgrev. Her er hon í torvi saman við skyldmanninum Sakarissi. Marianna var abbasystir hansara*



*Børnini hjá Sigurd og Dortheu. F.v. Sigurd, Marion og Peter.* ***Frammanfyri*** *er Wil Schomburg, maður Marion*

fyri at sigla. Tí tørvaði henni onkran at fylgjast við.

Hesa uppgávu fekk Dorthea gjøgnum beiggja sín Hans Marius, sum tá fiskaði við einum trolara út frá Canso í Nova Scotia saman við Sigurd.

Dorthea hoyggjaði í Koltri, tá ið mamma hennara fekk eitt bræv, ella kanska hevur tað verið telegram, frá Hans Marius um, at hann hevði eitt arbeiði til Dortheu. Mamman sendi straks boð eftir henni. Dorthea gjørdi skjótt av og fór avstað. Tað var kortini tungt hjá henni at fara frá øllum teimum, sum hon kendi. Men hetta var jú ein spennandi avbjóðing at fáa hjá ungari gentu tá í tíðini.

Dorthea fór við einum skipi til Bretlands og fór so við toki til Portsmouth. Hon hevur seinni greitt ommubørnunum frá hesi ferðini, tá ið hon sá hetta fremmanda landslagið við vøkrum urtagarðum um húsini, sum koyrt varð fram við.

Hon greiddi eisini frá ferðini um hav, har hon mátti hjálpa hesi kvinnu, sum var so ring av sjóverki. Sum tað skilst vóru tær nógv á dekkinum, helst av somu orsøk.

Dorthea steðgaði á í Boston, har hon arbeiddi eina tíð. Men tá helt hon, at frægast var at fara at vitja beiggja sín Hans Marius, áðrenn hon fór heim aftur. Hetta hevur eisini verið ein fittliga long ferð, einir 400 fjórðingar. Í Canada arbeiddi hon eina tíð sum húshjálp.

Tá er tað, at hon hittir Sigurd, sum siglir saman við Hans Marius, og tað endar so við, at tey giftast. Men hon yvirgav seg ikki so uttan víðari. Hann mátti fríggja tríggjar ferðir, áðrenn hon játtaði!

Tey høvdu eitt gott lív saman, men plagdu onkuntíð at arga hvønn annan. Dorthea plagdi at glósa mannin við, hvat ið kundi væntast av einum manni úr Puntabyrgi. Hann svaraði aftur, at hann dugdi ikki at síggja, at tað skuldi vera nakað frægari at vera úr Skopun!

**Dorthea kom eina ferð heim aftur**

Dorthea var bert eina ferð aftur í Føroyum. Hetta var í 1949. Tá ætlaði hon at fáa mammuna við yvir til Canada, so hon kundi búgva nærindis tveimum av sínum børnum sínar síðstu dagar. Marianna fór eisini við henni. Men tá ið tey koma til Danmark gerst Marianna sjúk og fór tí ikki longur. Hon livdi sínar síðstu dagar hjá fosturdóttrini Mourentsu í Danmark.

Sigurd var ongantíð aftur í Føroyum. Eftir at vera givin sum skipari arbeiddi hann fyri National Fish, skipaeftirlitið.

Tá ið hann fór frá sum pensionistur, var ætlanin at fara aftur til Føroyar at vitja, men hann bleiv sjúkur av krabbameini og doyði. Børnini hjá Sigurd og Dortheu hava ongantíð verið í Føroyum.

Tað kann verða nevnt, at Herluf Gaard Joensen úr Skopun var í sínum ungu døgum við Brandi Sigmundarsyni. Teir fiskaðu í St. Lawrenceflógvanum og komu inn til Halifax í 1961. Tá fingu tey vitjan umborð av Klæminti, Hans Marius, Sigurd og Dortheu. Tá gekk illa hjá Hans Marius at tosa føroyskt.

Ommu- og abbabørnini hjá Dortheu og Sigurd minnast væl Klæmint. Tey kallaðu hann "Uncle Clem". Hann var ein góður vinur við hini, sum eru nevnd. Menninir sigldu saman við sama skipi og búði í sama býi, til sonur Klæmint gekk burtur við einum trolara. Tá fluttu tey til Pictou í Nova Scotia.

**Tikin í tollinum við nylonsokkum**

Tá ið Dorthea kemur heim fer hon sum rímiligt er at vitja verfamiljuna í Puntabyrgi. Við sær hevði hon nakað, sum var serstakliga forvitnisligt fyri konufólk tá á døgum, nevniliga nylonsokkar. Sigurd átti fleiri systrar, sum høvdu verið sera forliptar um slíkt stás.

Men hetta gekk ikki væl. Tá ið Dorthea kom til Bretlands á veg til Føroyar vóru sokkarnir tiknir í tollinum. Tað var ringt at síggja nakra orsøk fyri hesum uttan at tollarin vildi útvega síni egnu konu hetta luksus, sum tað eisini var í Bretlandi. Hetta var sera snópisligt.

**Ættin**

Sigurd og Dorthea giftust 21. juni 1928. Tey fingu trý børn.

Elst var Peter Clement, føddur 16. mai 1930. Hann giftist 16. juli 1955 við Isabel Rosana f. Rowe, f. 1934. Isabel var í Føroyum saman við systir síni Carol Grantham, sum ikki hevur beinleiðis samband við ættina, men sum kortini vildi fáa hetta upplivilsi.

Tey fingu fimm døtur:

**1**. Kathryn Shawn, f. 1960, gift við James Ritson Longmire, f. 1959

**2**. Wendi Joanne, f. 1963, gift við Jeffrey Kenneth Deepnose, f. 1962. Tey eiga trý børn: Carlton Isak, f. 1989, Danne Signe f. 1992 og Anika Isabelle f. 1994.

**3**. Bonnie Louise, f. 1965, ógift.

**4**. Heidi Anne f. 1969, gift við Antonio Valim Bemfica, f. 1966. Tey eiga tvey børn: Felipe Marius, f. 1999 og Capitu Anouk, f. 2002.

**5**. Trude Jeanne f. 1971, gift við Gregory Lawson Inglis, f. 1963. Tey eiga 3 børn: Shani Rose, f. 2000, Jacquilyn Winifred Anne f. 2002 og Mitchell Lawson f. 2007.

Tríggjar av døtrunum Wendy, Heidi og Bonnie vóru við í Føroyum.

Næstelsta barnið hjá teimum var Margrethe Marion, f. 1932. Hon giftist við Will Schomburg f. 1928, sum var ættaður úr Týsklandi. Tey búsettust í



*Sigurd hjá Dortheu saman við Sharon fyrsta abbabarninum*

Pennsylvania. Tey fingu 2 døtur:

**1**. Sharon Lynn, f. 1956, gift við Ronald William Barrett, f. 1955. Hon býr í California, USA í San Fransiscoøkinum. Hon var við í Føroyum. Tey eiga 2 børn: Christopher James f. 1984 og Laura Elizabeth, f. 1989

**2**. Kathryn Ann f. 1959, gift við Donald Ray Hess, f. 1948.

Seinasta barnið var Sigurd jun. f. 1934. Hann er ógiftur og býr uttanfyri Halifax í Nova Scotia.

Í samband við ferðina til Føroyar høvdu tey eina heilsu við frá prestinum í kirkjuni, har Petur og Isabell koma.

Heilsanin var eitt sjal/teppi, og skuldi hetta vera til elsta fólkið í familjuni í Føroyum. Elst eftir Peter Lars og Margrethe er Gerda Einarsson, sum býr á Tvøroyri. Hon er dóttir Andreu, er 87 ár og er framvegis sera skilagóð.

Gerda giftist við Poul Einarson, ið var portørur, og í eitt langt tíðarskeið høvdu tey hotellið í Tvøroyri.

Tey eru foreldur Paula Einarsson, ið er kendur innan fyribyrging av oljudálking.

Nøkur av ættini í Puntabyrgi hava ætlan um at fara til Canada at ferðast í næstum. Tey fara 12. september. Hetta er eitt samband sum er komið fyri at vera.

Nú hava vit havt søguna frá tveimum av systrunum í Koltri. Í røðini Hendur í Sleptu fara vit at umrøða eina triðju systir, Onnu Katrinu í Fjósi.